# FC SUÐUROY SITUR VIÐ BESTU KORTUNUM

**Javnleikurin í Sandavági leygardagin ber við sær, at tað nú er FC Suðuroy, sum er favorittur at flyta upp saman við TB**

Jóannes Hansen

Tað kann fara at hava alstóran týdning fyri, hvør skal flyta upp saman við TB, at FC Suðuroy tríggjar minuttir undan leikloki javnaði til 1-1 í Sandavági leygardagin. Úrslitið ber við sær, at FC Suðuroy framvegis er eitt stig frammanfyri 07Vestur.

Tað resta fimm umfør, og hjá kappingarneytunum til seinna uppflytingarplássið sær skráin soleiðis út:

07Vestur: Víkingur (ú), NSÍ (h), TB (ú), KÍ (h) og EB/Streymur (ú).

FC Suðuroy: HB (ú), EB/Streymur (h), KÍ (ú), B36 (ú) og NSÍ (h).

07Vestur skal í triði síðsta umfari spæla við Stórá í Trongisvági. Tað verður torfør avbjóðing. Men úrslitini hesar seinastu ferðirnar vísa, at tað ikki altíð gongur, sum tað kann roknast við. Síðsta dømið um hetta var leygardagin, tá ið TB tapti á heimavølli ímóti Víkingi. Úrslitið var 1-0 til Víking. Hetta var fyrsta ferðin í ár, at TB fór av vøllinum uttan úrtøku. Einsamalla málið skoraði 18 ára gamli Magnus Jarnskor miðskeiðis í 2. hálvleiki.

Í Sandavági legði Torstein Mýlingstind heimaliðið framum fimm minuttir eftir steðgin, og tríggjar minuttir undan leikloki javnaði Búi Egilsson, sum er toppskjútti hjá FC Suðuroy. Torstein Mýlingstind hevur fyri tað mesta verið vongverji. Síðstu umførini hevur hann verið fremsti maður hjá vágamonnum, og tað hevur gingið væl. Burtursæð frá í 19. umfari hevur hann í øllum dystunum síðani 16. umfar og fram til 22. umfar skorað í hvussu so er eitt mál og niggju ialt.

– Vit ætlaðu okkum øll stigini, men tað eydnaðist ikki, og 1-1 kunnu vit ikki klaga um. Teir høvdu fleiri góðar málmøguleikar, enn vit høvdu. Vit vóna, at tað fer at eydnast at flyta upp, og vit fokusera á okkara møguleika, sigur 07Vestur liðformaðurin Gunleif Olsen, sum er 23 ára gamal og veteranur á sera unga 07Vestur liðnum.

Í FC Suðuroy hava teir gott mót um, at tað skal eydnast at vinna uppflytingina:

– Nú bíða næstbestu liðini hjá fimm feløgum. Teimum eiga vit at hava møguleika at vinna ímóti. At tað endaði javnt hesa ferð, eru vit nøgdir við. Men vit áttu at havt avgjørt longu í 1. hálvleiki, tá ið vit tríggjar ferðir sendu bóltin í stólpan, sigur FC Suðuroy spælarin Salmundur Bech.

## Botnurin rennur skjótt

Í botninum sær støðan hjá EB/Streymi ikki góð út. Hesa ferð tapti EB/Streymur 2-1 á heimavølli ímóti NSÍ. Tíðliga í 2. hálvleiki løgdu 17 ára gamli Meinhard Olsen og 16 ára gamli Petur Knudsen NSÍ framum 2-0. Ólavur Ejdesgaard minkaði stutt undan leikloki um munin við brotssparki. Tapið ber við sær, at EB/Streymur er fýra stig aftanfyri HB og seks stig frá plássinum omanfyri strikuna. Sigurin ber við sær, at NSÍ lyfti seg upp um B36, og at NSÍ harvið er á fjórða plássi.

KÍ og HB kappast um at sleppa undan næstaftasta plássinum. Mikukvøldið vunnu klaksvíkingar 2-0 á heimavølli ímóti EB/Streymi, og leygardagin vunnu teir 4-0 á útivølli ímóti AB. Eitt korter var farið, tá ið Jens Pauli Mohr setti hol á, og eftir litlari løtu tíðliga í 2. hálvleiki øktu Jóannes Danielsen og Jósup Henriksen um leiðsluna. Hóast KÍ misti ein mann, tá ið tað restaði ein lítil hálvur tími, so svaraði AB ikki aftur, og í síðsta minutti staðfesti Bárður Hansen rimmar KÍ sigurin á Argjum.

HB er framvegis undir strikuni, hóast tað hesa ferð endaði við 2-0 sigri í grannauppgerðini í Gundadali. HB hevur burtur úr seks teimum seinastu umførunum vunnið fjúrtan stig – fýra sigrar og tveir javnleikir. 16 ára gamli Adrian Justinussen skoraði fyrra málið, og tað seinna var sjálvmál. Adrian Justinussen var mikukvøldið fyri fyrstu ferð á næstbesta liðnum, og tá skoraði hann eisini. Í gjár var hann á dómaraseðlinum hjá besta liðnum, sum vann við Margáir.

### 1. Deild menn

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 22 | 19 | 2 | 1 | 60 | 14 | +46 | 59 |
| 2 | FC Suðuroy | 22 | 11 | 5 | 6 | 44 | 30 | +14 | 38 |
| 3 | 07 Vestur | 22 | 11 | 4 | 7 | 41 | 34 | +7 | 37 |
| 4 | NSÍ II | 22 | 9 | 4 | 9 | 48 | 41 | +7 | 31 |
| 5 | B36 II | 22 | 9 | 4 | 9 | 47 | 43 | +4 | 31 |
| 6 | AB II | 22 | 7 | 6 | 9 | 40 | 39 | +1 | 27 |
| 7 | Víkingur II | 22 | 6 | 7 | 9 | 32 | 44 | -12 | 25 |
| 8 | KÍ II | 22 | 5 | 7 | 10 | 35 | 49 | -14 | 22 |
| 9 | HB II | 22 | 5 | 5 | 12 | 30 | 55 | -25 | 20 |
| 10 | EB/Streymur II | 22 | 4 | 4 | 14 | 26 | 54 | -28 | 16 |

### Effodeildin støðan

FAROE SOCCER.com

| LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36 | 19 | 14 | 4 | 1 | 40 | 16 | +24 | 46 |
| HB | 19 | 11 | 6 | 2 | 42 | 16 | +26 | 39 |
| Víkingur | 18 | 7 | 8 | 3 | 34 | 21 | +13 | 29 |
| EB/Streymur | 19 | 7 | 6 | 6 | 30 | 26 | +4 | 27 |
| NSÍ | 18 | 7 | 4 | 7 | 36 | 23 | +13 | 25 |
| KÍ | 19 | 6 | 5 | 8 | 30 | 31 | -1 | 23 |
| ÍF | 19 | 5 | 7 | 7 | 27 | 35 | -8 | 22 |
| AB | 19 | 5 | 6 | 8 | 24 | 41 | -17 | 21 |
| Skála | 19 | 2 | 6 | 11 | 10 | 36 | -26 | 12 |
| B68 | 19 | 2 | 4 | 13 | 16 | 44 | -28 | 10 |

### MÁLTINDURIN TOPP 10

| | |
|---|---|
| Klæmint A. Olsen, NSÍ | 15 |
| Finnur Justinussen, Víkingur | 11 |
| Adeshina Lawal, B36 | 9 |
| Fróði Benjaminsen, HB | 9 |
| Hans Pauli Samuelsen, EB/Streymur | 9 |
| Árni Frederiksberg, NSÍ | 8 |
| Jákup á Borg, B36 | 8 |
| Páll A. Klettskarð, KÍ | 8 |
| Arnbjørn T. Hansen, EB/Streymur | 7 |
| Sorin Anghel, AB | 7 |

### KORT TOPP 10

| | | |
|---|---|---|
| Hans Jørgen Djurhuus, Víkingur | 2 | 3 |
| Hallur Hansson, Víkingur | 8 | 0 |
| Heini Vatnsdal, HB | 5 | 1 |
| Sorin Anghel, AB | 8 | 0 |
| Ari Ó. Ellingsgaard, ÍF | 4 | 1 |
| Atli Gregersen, Víkingur | 4 | 1 |
| Jens Joensen, NSÍ | 4 | 1 |
| Jonas Flindt Rasmussen, KÍ | 4 | 1 |
| Filip Djordjevic, Víkingur | 6 | 0 |
| Høgni Madsen, EB/Streymur | 6 | 0 |

22. UMFAR

**EB/St-NSÍ** 1-2 (0-0)
0-1: Meinhard Olsen 54.
0-2: Petur Knudsen 60.
1-2: Ólavur Ejdesgaard br 88.

**07V-FC S** 1-1 (0-0)
1-0: Torstein Mýlingstind 50.
1-1: Búi Egilsson 87.

**HB-B36** 2-0 (1-0)
1-0: Adrian Justinussen 33.
2-0: sjálvmál 73.

**AB-KÍ** 0-4 (0-1)
0-1: Jens Martin Pauli Mohr 15.
0-2: Jóannes Danielsen 50.
0-3: Jósup Henriksen 54.
0-4: Bárður Hansen 90.
Reytt kort: Gunnar Christiansen, KÍ, 62. (beinleiðis reytt)

**TB-Vík** 0-1 (0-0)
0-1: Magnus Jarnskor 68.

**23. UMFAR**

*Fríggjadagin 22. august*

B36-NSÍ

*Leygardagin 23. august*

TB-KÍ
Víkingur-07Vestur
EB/Streymur-AB
HB-FC Suðuroy

# NSÍ ER Á ODDA Í EYSTUROYNNI

Tað er sera javnt millum NSÍ, Víking og ÍF í eysturoyar-tabelini. Bert tvey stig skilja hesi liðini. NSÍ vann seg á fyrsta plássið aftaná tann góða 3-1 heimasigurin ímóti B68. Hjá B68 sær heldur einki út á eysturoyar-tabelinin, har liðið hevur tapt seks dystir, og hevur bert fingið tveir javnleikir, og hevur higartil ikki vunnið eina grannauppgerð í Eysturoynni. Í komandi umfari er ein eysturoyar-uppgerð, og verður hon mikukvøldið á Skála millum Skála og NSÍ.

**Úrslitini higartil millum tey fimm eysturoyar-liðini, ÍF, Skála, NSÍ, B68 og Víking :**

1. umfar : NSÍ-B68 1-0 (1-0)
2. umfar : Skála-NSÍ 1-5 (0-3)
3. umfar : ÍF-B68 3-0 (1-0)
4. umfar : ÍF-NSÍ 2-1 (2-0)
4. umfar : Víkingur-B68 1-0 (0-0)
5. umfar : Skála-Víkingur 1-1 (0-1)
7. umfar : B68-Skála 0-0
7. umfar : Víkingur-ÍF 1-1 (1-1)
8. umfar: Víkingur-NSÍ 3-0 (1-0)
8. umfar: Skála-ÍF 2-2 (1-1)
10. umfar: B68-ÍF 1-1 (0-0)
11. umfar: NSÍ-Skála 6-1 (5-1)
12. umfar: B68-NSÍ 0-2 (0-0)
13. umfar: Víkingur-Skála 5-0 (3-0)
14. umfar: B68-Víkingur 1-3 (0-2)
14. umfar: NSÍ-ÍF 2-2 (1-1)
16. umfar: ÍF-Skála 1-0 (1-0)
16. umfar: NSÍ-Víkingur (17. sept.)
17. umfar: Skála-B68 1-0 (0-0)
17. umfar: ÍF-Víkingur 2-2 (1-1)
19. umfar: NSÍ-B68 3-1 (3-0)
--------------------------------------
20. umfar: Skála-NSÍ
21. umfar: Víkingur-NSÍ
21. umfar: Skála-ÍF
22. umfar: ÍF-B68
25. umfar: Skála-B68
25. umfar: Víkingur-ÍF
26. umfar: Skála-Víkingur
27. umfar: NSÍ-ÍF
27. umfar: Víkingur-B68

**Støðan í Eysturoynni :**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. NSÍ | 7 dystir | 20-10 | 16 stig |
| 2. Vík | 7 dystir | 16-5 | 15 stig |
| 3. ÍF | 8 dystir | 14-9 | 14 stig |
| 4. Skála | 8 dystir | 6-20 | 6 stig |
| 5. B68 | 8 dystir | 3-15 | 2 stig |